# Fimleikaframsýnin









**Bæði framsýningin hjá teimum yngru liðunum og teimum eldru liðunum eydnaðist avbera væl, tá ið Ljósið hevði árligu fimleikaframsýningina um vikuskiftið**

FIMLEIKUR
*Teitur Joensen*

Nógv fólk var komið saman í ítróttarhøllini á Hálsi, tá ið fimleikafelagið Ljósið hevði árligu fimleikaframsýningarnar um vikuskiftið. Hildi var, at á leið 800 fólk, bæði vaksin og børn, høvdu leitað sær niðan í høllini.

Fyrsta framsýningin fevndi um tey yngru liðini hjá felagnum, meðan seinni framsýningin fevndi um tey eldru liðini. Kappingarliðini hjá Ljósinum vóru tó við í báðum framsýningum.

## Góðar sýningar

Vanliga koyra framsýningarnar eftir einum serligum leisti, har felagið roynir at geva teimum hátíðardám m.a. við at royna okkurt nýtt á hvørjum ári. Í ár royndi Ljósið seg við eini øðrvísi vælkomstheilsan, har ein ung genta beyð vælkomin saman við nøkrum amboðsíðkarum.

Fyrsta framsýningin, sum var á skránni, var sýningin hjá teimum yngru liðunum í felagnum. Tað er altíð stuttligt at síggja børnini gera lop og brøgd, og sum heild eydnaðist henda framsýningin avbera væl.

Fyrra framsýningin vardi í góðar tveir tímar, og var hon kanska heldur long. Hetta er tó ikki so merkisvert, tí Ljósið hevur fleiri amboðslið millum yngru liðini. Harafturat eru yngru liðini sum heild størri enn tey eldru.

Eftir framsýningina hjá teimum yngru var framsýningin hjá teimum eldru á skránni. Henda sýningin vardi í hálvanannan tíma, og hon gekk sera væl.